Kommunufelagið

Løgmansskrivstovan
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn

Dagfesting
26. januar 2018

Okkara j.nr.
18/00129-2

Málsviðgeri
Jóhan J. Lamhauge

Tygara j.nr.
0617-004/17

**Viðv.: broytingum í revsilógini**

Kommunufelagið skal hervið koma við viðmerkingum til uppskotið um broytingar í revsilógini, ið er sent felagnum til hoyringar.

Kommunufelagið hevur ikki ítøkiligar viðmerkingar til einstøku lógarteknisku broytingarnar, tí til tað er hoyringarfreistin ov stutt, og evnið alt ov týdningarmikið. Hinvegin, útfrá einum generellum og samfelagsligum sjónarhorni, loyva vit okkum at undrast á, at landsstýrið sendir eitt so samfelagsliga týdningarmikið uppskot til hoyringar og samstundis kemur sær at viðmerkja, at uppskotið ikki er rættlisið og at viðmerkingarnar ikki eru heilt lidnar.

Tá seinasta uppskot til broytingar í revsilógini var fyri á sumri 2016, hevði Kommunufelagið yvirskipaðar viðmerkingar, og loyva vit okkum mun at vísa til hesar somu generellu viðmerkingar, sum í stóran mun framvegis sýnast at vera aktuellar. Avrit av nevndu viðmerkingunum er hjálagt.

Vegna Kommunufelagið

Dennis Holm, formaður

Eyðun Christiansen, stjóri

R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn

Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo